Trý lið á odda í 1. deild

Óventaður stórsigur til hvalvíkingar og tepur sigur til havnarmenn hevur við sær, at trý lið nú eru jøvn fyrsta plássi í ovastu deildini eftir sjeynda umfar.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Seinastu nógvu vikurnar hava klaksvíkingar fyri hvørt umfar styrkt um teirra oddastøðu, men hetta vikuskifti vildu hvalvíkingar annað. Teir fóru manssterkir til Klaksvíkar og fóru yvir um Leirvíksfjørð aftur við stórsigri í skjáttuni. Heili 3-1 varð úrslitið.

Martin Brekká hevur í ár verið sera støðugur, og ímóti Rana Nolsøe fekk hann eisini fyrimun í byrjanini. Hann fekk sær eina frífinnu, sum plágaði Rana somikið, at hesin tók hesa við at lata frúgv fyri rók og bisp. Martin hevði tá nóg góða støðu at avgera talvið til hansara fyrimun. Steintór Rasumussen, sum annars higartil í ár hevur havt góð úrslit, var ikki við sunnudagin.

Á øðrum borði tapti klaksvíkingurin Tummas M. Anthoniussen á fyrsta sinni í ár. Finnbjørn Zachariassen bleiv tann fyrsti at bróta sigurðsrað Tummasar í einum longum drúgvum rókaendatalvi.

Sámal Christiansen fekk avviklað fyrimun sín ímóti Ingolf Gaard til vunnið endatalv við at hertaka sjeyndu rað við rókum sínum.

Rúni Dragaberg bjargaði æru klaksvíkinga við sigri sínum á Gunnar Joensen. Rúni vísti hegni í sisilionsku byrjanini og vann heldur lættliga.

Júst sum flest væntaðu at klaksvíkingar sjálvir fóru at avgera FM-heitið blivu teir steðgaðir, og hava hvalvíkingar nú eins nógv stig.

Høvuðsstaðarfelagið hevur um endan

Skjótt kann venda, eisini í talvi. Við 2,5-1,5 sigrinum ímóti vestmenningum liggja havnarmenn nú á deildum fyrsta plássi.

Haldur S. Johansen var væl fyrireikaður tá hann fekk javnleik ímóti John Rødgaard. Talvið vardi bert seytjan leikir.

Herluf Hansen og Torbjørn Thomsen leiktu somuleiðis ein stuttan javnleik á øðrum borði. Herluf hevði yvirvág tíðliga í miðspælinum, men Torbjør útjavnaði.

Á triðja borði stóð Suni Merkistein nakað kroystur, men John Jacobsen fekk ikki avgerandi fyrimun og javnleikur bleiv samdur.

Einasta avgerandi talv í hesum dysti varð talvið ímillum Olaf Berg og Petur Højgaard. Olaf telvaði væl, har hann í røttum Tal-stíli fekk fólk síni í røttu álopsstøðu, og vann tá sannførandi.

Enn ein kærkomin sigur til havnarmenn, men hinvegin eru vestmenningar enn við. Bert hálvtriðja stig er upp til oddan.

Í Kollafirði var botnliðið úr Sandavági á vitjan og fingu teir heiðurligt úrslit vestur við aftur, nevnliga javnleikur 2-2.

Eitt lítið afturstig hjá kollfirðingum, men teir eru bert eitt stig aftan fyri tey trý fremstu liðini, og tískil kunnu teir enn saktans náa teirra mál.

Spenningurin er øktur nú bert trý umfør eru eftir at leika. Komandi leygardag verða dystirnir hesir; Hvalvík — Havnin, Sandavági — Klaksvík og Vestmanna — Kollafjørður.

John Arni Nielsen var millum teirra, sum um vikuskiftið vóru við til at tryggja talvútisetunum ein tryggan sigur. Nóg mikið til at varveita oddasessin var sigurin tó ikki

Havnin enn fremst í 2. deild

Líkt er til at bert toftamenn kunnu steðga havnarmonnum at flyta upp í fyrstu deild. Síðani ferfaldaði føroyameistarin Jens Kristian Hansen er komin við aftur hevur eydnast væl hjá teimum. Havnin 3, sum liggur klárt aftast, megnaði tó at fáa hálvtannað stig frá toftamonnum.

Toppdysturin millum Runavík og Havnina 2 endaði við 2,5-1,5 sigri til Havnina, sum helst eisini brast vónirnar hjá runavíkingum um uppflyting.

Gøtumenn hanga enn í, og við 3-1 sigrinum á Klaksvík liggja teir nú á triðja plássi.

Í 3. deild liggja vestmenningar tvey stig fremstir, meðan havnarmenn á øðrum plássi liggja hálvt stig framanfyri kollfirðingar. Vestmenningar hava eitt sterkt lið, og ringt verður tí at steðga teimum.

Útisetar mistu leiðsluna

Stórsigurin 5,5-2,5 á Københavns Skakforening um vikuskiftið varð ikki nóg mikið at varðveita fyrsta pláss í triðju deild í dansku liðkappingini. Hitt toppliðið úr Ballerup sín dyst 6-2, og eru tí hálvt stig fremri enn Talvfelagið Føroyar. Bert tvey umfør resta í.

Liðið føroyingarnir vunnu á var nakað væl veikari, teir høvdu úr 2200 niður til 1800 í rating. Teir, sum vunnu, vóru John Arni Nilssen, Bogi Ziska, Heini Danielsen og Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Heini Olsen, Eyðun Nolsøe og Jóan H. Andreasen leiktu javnleik, meðan Terji Petersen tapti.

Talvið hesa vikuna

Í januar mánaða bleiv fyrrverandi heimsmeistarin Boris Spassky 64 ár, og er hetta í talvhøpi ein sera rundur føðingardagur. Í talvi er nevnliga 64 puntar.

Hesum í huga havi eg valt at vísa hvussu Spassky innan fáir leikir vann á tiltikna Bobby Fischer í vælkenda HM-dysti teirra millum í 1972, sum Fischer sum kunnugt flest tó vann.

Spassky,B (2660) - Fischer,R (2785)
World Championship 28th Reykjavik (11), 1972

1.e4 c5 2.Nf3 d6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 a6 6.Bg5 e6 7.f4 Qb6 8.Qd2 Qxb2 9.Nb3 Qa3 10.Bxf6 gxf6 11.Be2 h5 12.0-0 Nc6 13.Kh1 Bd7 14.Nb1 Qb4 15.Qe3 d5 16.exd5 Ne7 17.c4 Nf5 18.Qd3 h4 19.Bg4 Nd6 20.N1d2 f5 21.a3 Qb6 22.c5 Qb5

23.Qc3! fxg4 24.a4 h3 25.axb5 hxg2+ 26.Kxg2 Rh3 27.Qf6 Nf5 28.c6 Bc8 29.dxe6 fxe6 30.Rfe1 Be7 31.Rxe6 1-0

VIÐMERKINGAR

Nú byrjar at líkjast… og klappini runga!

Bjarni Djurholm

Tað er sjón fyri søgn, nú prosessin er vend á høvdið – at sjálvt í gaddajørð kann sáð bera ávøkst.

Hóskvøldið 1. februar 2001 skipaði løgmaður fyri tíðindafundi um nýggju sjálvstýristilgongd landsstýrisins. Hóast enn er langt á mál, so var boðskapur løgmans greiður, nú verður lagt á pragmatiska leið - við eini fólkaatkvøðu í bakinum at røkka semju við danir um sjálvstýristilgongdina.

At landsstýrið loksins er vorðið samt um at venda sjálvstýristilgongdini á høvdið, eru mong sum frøast um. Farnu trý árini er ávarað móti framhaldandi krampakent at halda fast við fullveldistøkuni sum fyrsta stigið. Tað hevur ligið á ljóði, at so verður kvett á stokkinum við 4 ára skiftistíð. Samstundis er lítið komið burturúr at tillaga samfelagsbúskapin at vera sjálvberandi – at sleppa úr heimastýrisbúskapinum.

Í sambandi við viðgerðina av ólavsøkurøðu løgmans í august í fjør, mælti undirritaði enn einaferð til at venda sjálvstýristilgongdini á høvdið. Orðini vóru hesi:

”Nú landsstýrið staðfestir, at við verandi samráðingargongd er skiftistíðin ultimativt 4 ár, og at sáttmáli Føroyar og Danmarkar millum eftir hesum leisti hvørki eigur parlamentariskan meiriluta ella stuðul millum manna, so er neyðugt at tillaga samráðingarupplegg til henda veruleika, og, sum eg síggi tað, so er tað gjørligt uttan at sleppa málsetninginum í samgonguskjalinum.

Tí kundi tað verið eitt uppskot, at processin varð vend á høvdið. Raðfylgjan í tilgongdini um fullan suverenitet kann ikki vera avgerandi fyri um málið verður egg ella ungi.

Tað kundi verið ein gongd leið, at samantvinnanin av suvereniteti og skiftistíð varð liðað sundur og landsstýrið so miðjar eftir at gera sáttmála við suvereniteti sum endaliga málsetning.

Hetta kann fremjast, um sáttmálin Føroya og Danmarkar millum ásetir, at løgtingið einsamalt hevur heimild at yvirtaka øll málsøki og at gjaldingin fyri hvørt málsøki sær verður at gjalda av landskassanum so hvørt, sum yvirtikið verður og/ella valt verður at gjalda fyri longu yvirtikin mál. Sostatt hevði tað verið gjørligt hjá okkum at skipa fíggjarligu skiftistíðina eftir tí áramáli, sum parlamentariski meirilutin metir at vera rætt, og hevði hetta eisini sampakkað við setning landsstýrisins um at skipa skiftistíðina eftir okkara fortreytum.

Vinnur slíkt uppskot frama og vilji er at yvirtaka málsøki fyri 50, 100 ella fleiri mio um árið og skiftistíðin verður samsvarandi (í øvugtari raðfylgju) 4, 8 ella fleiri ár – so verður tað løgtingið og í síðsta enda føroyski veljarin, sum fer at hava endaligu avgerðina.

Hetta uppskotið ella skipan gevur okkum ikki suverenitet frá fyrsta degi, men málsetningurin er greiður – stjórnarvald Føroya hevur málsræði á øllum yvirtiknum málum. So hvørt sum felagsskapurin landanna millum verður tómdur fyri pengar, verður minni og minni, við forðar fyri, at suvereniteturin gerst veruleiki, ger løgtingið av at skipa Føroyar sum fullveldi. Slíkur sáttmáli er eisini í samsvar við setning samgongunnar og verður eisini trupul hjá dansku stjórnini at vísa frá sær”.

Hesi vóru orðini 3. august í fjør. Móttøkan var ymisk. Meðan summir flokkar tóku undir við uppskotinum, so vóru aðrir greitt ímóti at venda processini á høvdið og soleiðis slóða fyri pragmatiskari loysn á ríkisrættarliga knútinum Føroya og Danmarkar ímillum.

Í november gjørdi løgmaður hol í sjógv og samdist við statsministaran um at seta niður embætisfólk at gera niðurstøður um praktisku niðurskiftini í sambandi við yvirtøkur undir heimastýrisskipanini og seta upp sokallaðan negativlista um tey mál, sum ikki kunnu yvirtakast fyrr enn sjálvstýrið er veruleiki.

Niðurstøðurnar hjá fløkkar tóku undir við uppskotinum, so vóru aðrir greitt ímóti at venda processini á høvdið og soleiðis slóða fyri pragmatiskari loysn á ríkisrættarliga knútinum Føroya og Danmarkar ímillum.

Í november gjørdi løgmaður hol í sjógv og samdist við statsministaran um at seta niður embætisfólk at gera niðurstøður um praktisku niðurskiftini í sambandi við yvirtøkur undir heimastýrisskipanini og seta upp sokallaðan negativlista um tey mál, sum ikki kunnu yvirtakast fyrr enn sjálvstýrið er veruleiki.

Niðurstøðurnar hjá føroysku/dansku embætisfólkunum vera almannakunnugar í næstum. Spennandi verður at síggja, hvussu hesar fáast at sampakka við nýggju sjálvstýristilgongdina, sum lýst varð hóskvøldið. Í samandrátti er nýggja tilgongd landsstýrisins nú henda:

1. Innan fyri heimastýriskarmin verða øll málsøki so við og við løgd undir føroyskt málsræði. Henda tilgongd skal vera liðug í 2012.
2. Skipan av búskapargrunni skal tryggja búskaparligu skiftisskipanina.
3. Heildarætlanin úr Danmark verður stigvíst minkað burtur.
4. Fólkaatkvøða um fult sjálvstýri verður í 2012.

Hóast mong løgfrøðilig ivamál skulu greiðast, áðrenn innihaldið í ætlaðu fólkaatkvøðuni 26. mai 2001 endaliga verður ásett, so hevur landsstýrið í nýggju sjálvstýristillaginginni loksins skotið upp tilgongdina sum kann leiða á mál.

Tað er eyðsýnt, at nýggja sjálvstýristilgongdin er í fullum samljóði við tilmælið frá undirritaða í august í fjør. Tá vóru tjóðveldismenn ikki sørt firtnir um uppskotið at venda processini á høvdið. Men ofta etur hundur tað hann havnar – sigst.

Undir tíðindafundinum hóskvøldið, har landsstýrið avdúkaði nýggju pragmatisku sjálvstýrisleiðina, kvitteraði ein samdur tjóðveldistingmannabólkur nú við rungandi lógvabrestum!

Tí kann ikki annað sigast enn at sjálvt í gaddajørð kann sáð bera ávøkst.

Jóna Rasmussen sýnir fram

Í døgunum frá 3. februar til 7. mars sýnir listakvinnan Jóna Rasmussen úr Havn fram í Kolding. Jóna er boðin at hava eina serstaka framsýning í "Galleri Elise Toft", Låsbygade 58 í Kolding. Hon stillar út uml. 20 málningar og harafturat grafisk bløð. Seinri í ár luttekur Jóna á einari føroyskari framsýning í Frederikshavn Kunstmuseum, har 10 føroysk listafólk sýna fram.

Skeið um kolvetnisídnaðin

TÍÐINDASKRIV

Føroya Sparikassi og Reveal International fara nú í samstarvi at skipa fyri eini skeiðrað á høgum stigi, til gagns fyri vinnulívið. Hendan skeiðrøðin fer at bera heitið INNLIT.

Tað fyrsta skeiðið verður hildið 8. og 9. mars 2001 og fer at fevna um kolvetnisídnaðin. Hetta skeið er ætlað leiðarum og starvsfólki á virkjum, sum kunnu hava fyrimun av eini nágreiniligari fatan av kolvetnisleiting, boring og útvinning.

Skeiðið verður hildið á enskum, og fyrilestrahaldarar verða Tom Jones, BA,ACTS og Eric Hughes, BSc. Hesir báðir hava arbeitt sum toppleiðarar innan kolvetnisídnaðin og hava sostatt holla vitan og royndir á hesum øki.

Meiri fæst at vita á heimasíðunum www.sparikassin.fo og www.reveal.fo

Siga Føroya Sparikassi go REaveal International í tíðindaskrivi.

Suðuroyggin er partur av Føroyum… enn

Finnleif guttesen
borgarstjóri

Hvussu leingi hetta er veruleiki vil tíðin vísa, Lítla Dímon er eisini partur av Føroyum, men har er bert livandi hjá seyði.

Nú ætli eg mær ikki at tjakast við Dánjal Bjarkhamar, býráðslim í Vági í bløðunum og eg taki fult undir við tí hann sigur seinast í grein síni 31. januar í Dimmu um, at vit sum búleikast í Suðuroy skulu samstarva- oynni og tí fólki her býr at gagni.

Men eg takið ikki undir við, at verandi samgonga og aðrar við, hava givið okkum sum búleikast í Suðuroy nakrar sømdir sum eru at rópa hurra fyri. Tað sum er komi her suður hevur bert gjørt tað, at vit tilkomnu yvirliva meðan børn okkara rýma, tí her er einki at koma aftur til. At børnini koma aftur í ferium er ikki tað sama sum at búleikast her.

Fitt og góðtrúgvin

Vit sum búleikast her suðri skulu ikki bara lata standa til, vera so óluksáliga fitt og góðtaka alt, vit skulu krevja okkara rætt sum ein partur av Føroyum og fáa vit ikki henda rætt so eiga vit at taka avleiðingina av tí, ein møguleiki er loysing og tað er altjóða viðurkent.

Afrika og niðurpíning

At ein advokatur heldur at skilið skal blíva líka so ringt sum í Afrika við loysing, har tey blíva knúst við harðari hond og í blóði trúgvi eg ikki, men at Annfinn og samgongan kann banka okkum uppá pláss er nakað annað, tí hetta er longu við at henda, tað vísur gongdin í Suðuroy.

Hvat er eftirfarandi

Hvussu nógv hald er í tí ætlan, sum verandi samgonga hevur viðvíkjandi íløgum í Suðuroy vil eg seta eitt stórt spurnartekin við.

At Torbjørn Jackobsen hevur skori ígjøgnum og sagt at Almanna-og Heilsuskúlin skal liggja á Tvøroyri taki eg hattin av fyri, men har er ikki eitt klovi oyra fylgt við til at seta skúlan á stovn, Tvøroyrar kommuna hevur bori allar útreiðslurnar av skúlabygninginum.

At hesin skúli kemur í gongd er eingin ivi um, tað skal so ikki skorta uppá viljan frá Tvøroyrar kommunu, um viljin frá landsins mynduleikum viðvíkjandi íløgum og fígging er líka so góður vil nærmasta tíð vísa.

Samanhald

Eg vóni at suðringar fara at gera meira vart við seg yvir fyri teimum sum ráða í Føroyum, líkamikið hvat politiskan lit teir hava.

At vit sum búleikast her suðri standa saman, og krevja okkara sjálvsagda rætt til møguleikarnar, sum finnast í hesum landi.

Vit kunnu ikki blíva við, at vera fitt og lata okkum alt linda.